# TVØROYRI 150 ÁR



Útgevari: Tvøroyrar Býráð
Sett og umbrotið: Pf. Hestprent
Prent: Norðlýsið
Innbinding: Bókavirkið
Perma: Lis Dam Guttesen

*Í fyrireikingarnevndini fyri tiltøk í samband við Tvøroyri 150 ár — millum annað henda bókling — eru: Hildubjørg Brattalíð, Pauli Einarsson, Daniel Hofgaard, Einar Larsen, Gunnar Magnussen, Hans Samsonsen og Randi Strøm.*



Jens Dam, við setikassanum á prentsmiðjuni hjá Føroyatíðindi.

# TVØROYRI 150 ÁR

Tvøroyrar Býráð 1986



# Inngangur

Gongur tú bygdagøturnar, liggja varðarnir kenniligir eftir fjallinum; heldur tú teg eftir teimum, finnur tú vegin til hús. Men tú tekur tað við rógv, støðgar á og ert tryggar, tí leiðin er vís. Tú stendur við ein varða og letur hugin sveima, letur hann fylgja tíðarrásini og steðga við ein varða á henni — hesin eitur 1836. Tú kannar henda varðan væl, kannar hvønn stóran sum lítlan stein, hvørt klípi, og hvat spratt úr øllum tí, ið varð grundað tá. Fruktin av øllum tí, ið tá fór at grógva, er Tvøroyri, sum nú heldur sín hundrað og fimtiára føðingardag, hóast sóknin er munin eldri, tí hinar bygdirnar við Trongisvágsfjørð, Froðba, Trongisvágur og Øravík, hava eftir øllum at døma sínar røtur heilt afturi í fyrstu búsetingini her á landi. Við fjørðin her var tingstaðurin Uppi ímillum Stovur oman fyri Øravík, so suðringar vóru vanir at sigla inn her, og tá ið úthandilin hjá kongliga handli kom og seinni stórhandlar, ið áttu nógv skip, komu ikki bert suðringar, men fólk úr so

at siga hvørjari bygd í landinum at søkja sær vinnu og summi eisini at seta seg í búgv.

Inn á fjørðin eru í øldir komnir friðarligir, fremmandir handilsmenn við skipum sínum, og hevur fólk í loynd handlað við teir, hóast tey vóru í vanda fyri at verða revsað; og einki er at dylja yvir, at summi ár átti hesin loynihandilin lívið í fólkinum her.

Fjørðurin boðaði eisini frá ófrættum, tá ið fólk noyddust at flýggja til fjals undan ófriðarkroppum, ið komu inn higar at ræna bæði fólk og fæ. Tíbetur hendi hetta sjáldan.

Eisini tá ið fjørðurin lá tómur, og bátar, ið siglt høvdu út fjørðin antin til handils ella útróðrar, ikki komu afturíaftur. Hóast fólkið vónaði, bað og bíðaði, so fingu summir av okra forfedrum váta grøv.

Somu myndina finna okur aftur í nýggjari tíð — slupptíðini — tá ið fólkið fegið rópti fagnaðarróp; „Segl í fjørðinum“! So hendi tað ikki so sjáldan, at teir, ið komu aftur av langferð, høvdu flaggið á hálvari stong: tey mongu fingu síni kæru aftur, men summi rakti hin kaldi, miskunnarleysi missurin.

Bygdarfólkið hevur sett teimum, ið fórust, minnisvarða — eitt varandi og ávarandi minni hjá núlivandi og komandi ættarliðum.

Flokkar av ungfólki úr øllum landinum komu og fóru; tey tóku tøkini, ið okra nútímans samfelag hvílir á, tey livdu sítt lív í arbeiði, hvíld og gleimi. Tann nýggja mentanin uttan úr londum rein væl við, og gomul og nýggj mentan treivst væl her: ongastaðni gekk dansurin betur, ongastaðni varð spælt, sungið og dansað sum her; men álvarsmálini í lívinum vórðu ikki gloymd, og kirkja og samkomur — trúarvarðarnir — vóru livandi tættir í lívinum.

Hetta lítla rit, tú nú lesur, kann bert geva eina fábroytta mynd av einum so fjøltáttaðum samfelagi sum okra. Hundrað og fimti er sera stutt tíðarskeið í mun til onnur býarsamfeløg, okur kenna úr søguni, men hóast okra Tvøroyri er ungt, hevur tað havt avgerandi árin á lívið her á landi. Uttan mun til hvussu bygdin hevur ment seg, hvat er farið fram og hvussu, so eru okur her á staðnum trúgv ímóti og æra okra bý. Nú vitja mong av okra aftur higar at heiðra Tvøroyri og minnast:

**„Og sólin á sumri skínur á heyg**
**og randar fjøllini logandi reyð**
**og stormurin á vetri ýlir í skørð,**
**og bylgjurnar brúsa mót skelvandi jørð,**
**og fjøllini standa so hóttandi ill**
**og so døkk og so vill,**
**tá gevur bardagin við havið og stormin mót**
**og ger okum harðfør sum blágrýtisgrót,**
**og trúfast í bróstinum hjartað slær,**
**at okur við vælmeintum ídni vilja virka fyri tær.**

**Tillukku**

# „Kgl. resolution af 20de april 1836"

*Brot úr Kgl. resolution af 20de april 1836, sum snýr seg um kgl. úthandlarnar. Upprunaskrivið er at finna í savninum hjá Færø Amt undir F.A.J. Litra J N 121:*

*Efter Rentekammerets allerunderdanigste Indstilling har Hans Majestæt under Dags Dato bifaldet,*

*1. at den færøeske Handel fremdeles indtil videre maa fortsættes for Allerhøist Sammes Regning í Overeensstemmelse med de gældende Regler, og navnlig de Forskrivter der inneholdes i allerhøieste Resolution af 10de Decb. 1834.*

*2. at der, foruden Handelsstedet i Torshavn, maae anlægges trende nye Handelsetablissementer paa Færøerne nemlig:*

*et i Trangisvaag paa Suderøe,*

*et i Vaai paa Norderøe og*



Í krambúðini hjá Thomsen umleið 1925. Ljós (el) er lagt inn, men petroleumslampan er ikki tikin burtur. Fremst á myndini kanska elsti pengakassin enn í brúki av hesum slagi. Hann hevur staðið á sama palli frá byrjan. Á skivuni sæst, at bakarin hevur sett bakkan við wienarbreyðum inn, klár at selja.

*et enten i Vestmannahavn paa Nordstrømø eller i Sandevaag paa Vaagøe, eftersom det ved nærmere undersøgelse matte være beqvemmest.*

Uttan iva hevur frammanundan verið gjørt av, at kgl. handilin skuldi byggjast har, hann nú stendur, tí hetta hevur verið høgligasta plássið við fjørðin fyri allar partar, og froðbingum hevur ikki verið trongligt við haga, um lendi varð latið burturav til handilin. Í fólkateljing 1834 sæst, at búsetingin við Trongisvágsfjørð er soleiðis:

*í Øravík 55 fólk í 7 húsum*
*í Trongisvági 73 fólk í 11 húsum og*
*í Froðba 69 fólk í 12 húsum.*

*Kgl. handilin broytir búsetingina so við og við. Í Suðuroyar Kirkjubók 1832—1852 eru fyrstu fólkini búsett á Tvøroyri skrivaði soleiðis:*



| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5. Joen Dionesen Nolsøe | 38 aar | Handelsbetjent paa Tværøre | Fra Thorshavn | Annkommne til |
| 6. Margrethe Nolsøe f. Joensdatter | 36 Aar | Hans Hustrue | Ligeledes | Handelseta- |
| 7. Henrik Grot Nolsøe | 3 Aar | Deres børn | — | blissementet ved |
| 8. Ellen Marie Nolsøe | 5 Aar | — | — | Tværaae, |
| 9. Josephine Kathrine Nolsøe | 10 Mdr. | — | — | Frodebøe |
| 10. Morten Christiansen | 36 Aar | Deres Tyende | — | Sogn den 27. |
| 11. Frederikke Guttormsdatter | 20 Aar | — | — | Octber. 1836. |

Fara vit longri fram í fólkateljingini — t.d. 1840 og 1901 sæst, at tað:

| | | | |
|---|---|---|---|
| *í Øravík* | *1840* | *búgva 57 fólk* | *í 7 húsum* |
| | *1901* | *búgva 73 fólk* | *í 9 húsum* |
| *í Trongisvági* | *1840* | *búgva 74 fólk* | *í 11 húsum* |
| | *1901* | *búgva 154 fólk* | *í 24 húsum* |
| *í Froðba* | *1840* | *búgva 69 fólk* | *í 11 húsum* |
| | *1901* | *búgva 140 fólk* | *í 21 húsum* |
| *á Tvøroyri* | *1840* | *búgva 10 fólk* | *í 1 húsi* |
| | *1901* | *búgva 593 fólk* | *í 82 húsum.* |



Faktorin við húski flutti beinleiðis í Roykstovuna, tá tey, 27. oktober 1836, komu til Tvøroyrar.

Framgongdin í fólkatalinum í sóknini, stavar uttan iva frá teimum betraðu livikorum Kgl. Handilin hevur givið, og stóri vøksturin sum sæst í 1901 — mest á Tvøroyri — prógvar at tey bæði handilshúsini Thomsen og Mortensen nú rættiliga gera um seg.

# Frá einahandli til fríhandil

Manna millum var fyrst í farnu øld stór ónøgd við, at bert ein handil var í Føroyum, og at hann var í Havn, bøtti ikki um støðuna. Handilsferðirnar til Havnar vóru illa lýddar, og tí tók seg upp stórur loynihandil við fremmand handilsskip, ið vitjaðu inn á firðirnar í Suðuroy. So stórur var hesin loynihandil, at valla var tilkomin maður í Suðuroy, ið ikki hevði keypt frá hesum skipum. Landsins leiðandi menn skiltu, at stirvna handilslagið var ein forðan fyri framburði í landinum, og helst man tað vera Pløjen amtmanni mest fyri at takka, at á Tvøroyri kom ein úthandil av einahandlinum í 1836. Hesin handil hevði til uppgávu at selja neyðturviligastu vørurnar og at taka ímóti tí, fólk høvdu at avreiða.

Í tey 20 árini „Etablissement Tveraa“ starvaðist, var lítil og eingin framgongd á plássinum. Handilin gav bert arbeiði til tey fólk, sum


Skjöde.


Berthine Marie Hansine Thomsen, der driver Forretning paa Færøerne under Navnet T. F. Thomsen, Tranguvaag, Færøerne, fornævnte Kutter „Fawn", hjemmehørende i Tranguvaag paa Færøerne, drægtig 55 $\frac{48}{100}$ Tons, mærket D. E. og forsynet med Registreringsbogstaverne N. B. C. W.

Efter Overdragelsen er jeg fyldestgjort.

For det stemplede Papirs Skyld bemærkes, at Værdien ikke overstiger 4000 Kroner, hvorefter der anvendes Stempel til Taxt Kr. 6. 65 Øre —

Kjöbenhavn den 7 April 1891

Carl Benque

Til Vitterlighed

B. [illegible] A. Andersen



T.F. Thomsen, maðurin, sum keypti Kgl. Handelsetablissement ved Tveraa 1856.

Skjalið vinstrumegin er skeyti uppá sluppina „Fawn" (nakað stytt vegna plásstrot).

Tá ið sluppirnar vóru nógvar í tali, var bedingsarbeiðið av tí mesta. Her síggja vit Nellie á uttara vogni, og nakrar av bedingsmonnunum rætta ryggin.




starvaðust har; og kom skip við vøru, var lagamanni at fáa fólk at skipa upp farmin, bæði úr Øravík, Trongisvági og Froðba. Ikki fyrr enn handilin varð seldur í 1856, kemur vend í. Tá fara keypmenninir T.F. Thomsen og í 1859 Johan Mortensen at handla á plássinum. Longu í 1860 eru 7 hús komin afturat og fólkatalið vaksið til 66. Men tann stóri og knappligi vøksturin á hesi ungu bygd, sum eftir fáum árum taldist millum tær størstu, byrjaði ikki fyrr enn sluppfiskiskapurin í 1890-unum av álvara fer at taka seg upp, og tá gekk umleið helvtina av føroyska skipaflotanum út frá Trongisvágsfirði.

Av fyrstu skipum, Thomsens handil keypur kunnu nevnast:

Jaktina **Marie** í nov. 1859, skonnartin **Robert** umleið 1860—61, jaktin **Adam Wilhelm** í 1863.

Og Mortensens handil keypir:

Jaktina **Emmanuel** í 1859, jaktina **No 5 (Grøna)** í 1863 og skonnartina **Falken** í 1863.

*Kelda: Føroya Siglingarsøga*

# Fyrstu fakfeløg í Føroyum

Óivað hevur hugsjónin „Fakfelag" í byrjanini av 19'talinum, verið mett mest sum ein sápubløðra, men í einum so livandi samfelagi, sum Tvøroyri hevur verið upp gjøgnum tíðina, varð væntað, at fakfeløg fyri ymsar bólkar fóru at taka seg upp. **So varð.** Fyrsta arbeiðsmannafelagið í Føroyum sá dagsins ljós á Tvøroyri 25. apríl 1915 við navninum „Enigheden". Seinni varð hetta broytt til „Fylking", so sum navn felagsins er enn.

Tær nógvu fiskagenturnar, sum ár út og ár inn høvdu dagliga vinnu her í bygdini, hava sæð, at fyrimunir hava verið við slíkum fakfelagi, og høvdu tá tað áræði 29. januar 1922 at stovna fyrsta arbeiðskvinnufelagið í Føroyum við navninum „Fiskepigernes Fagforening".

Hesi feløg við sama endamáli, at betra arbeiðs- og lønarkor limanna, hava sett síni týðandi spor í fakfelagssøgu Føroya. Tá ið hesin felagsskapur var komin fyri seg, bygdi felagið Fylking hús á somu grund, sum fyrra kirkjan á Tvøroyri hevði staðið á; og her húsast bæði tey elstu fakfeløgini í Føroyum ídag.



Magdalena Olsen, Tvøroyri, formaður í fyrsta føroyska arbeiðskvinnufelagnum.



Thomas Michael Strøm, Trongisvágur, fyrsti fakfelagsformaður í Føroyum.

# Skúlin

Í bygdunum kring landið vóru altíð onkur, ið dugdu so mikið at lesa og skriva, at tey lærdu frá sær so frægt, at ungdómurin kundi sleppa fyri prest at konfirmerast. Summi av hesum fólkum høvdu gingið í skúla hjá presti í Havn; men tey flestu eru okkum í dag ókunnug. Tó kenna okur ein, ið hevur verið ferðalærari her í bygdunum, danin Rasmus Nielsen Høstmark, sum búsettist í Hovi, har okur finna hansara ættfólk sum føroyingar í fyrru helvt av 18. øld.

Tann mesti lærdómurin kom av tí praktisku fyrimyndini í gerandisdegnum, faðiri og móður; men har, fólk dugdu at lesa, varð lisin lestur, og sungnir sálmar, kvøðið varð, sagnir sagdar, gátur bornar fram; alt hetta gjørdi lívið ríkari, fjølbroyttari og liviligari og varðveitti soleiðis eisini tað føroyska málið og mentanina frá ættarlið til ættarlið. Okkara talu- og skriftmál í dag her á landi er fruktin av hesum sera einfalda, men ríka lærdómi.



Thora Pállson, tann fyrsta kvinnan, ið var lærari á Tvøroyri.



Tvøroyrar skúli umleið 1903, bygdur 1883.

Tann tekniska menningin, sum eisini fer at rína við her hjá okkum, ger, at í 19. øld verður neyðugt við skipaðari skúlagongd, og ferðalærarar verða settir. Hesi lærarafólk, sum frá 1812 hava frálæruna, hava hóast ymiskar fortreytir, verið vird og dugandi, men sera striltið gekk at fáa skúlagongdina í fasta legu.

Í 19. øld vóru 5 lærarar í Suðuroy: *Thorður Thorstensson (íslendingurin), Ole Jespersen (skúlahaldarin), Joen Joensen, Hans M. Nielsen (dani), D.J. Larsen og Tora Pálsson (Omma Bu).*

Thorður hevur regluligan umgang í allari oynni frá 1812—1835, tá ið hann bert verður í sunnaru helvt. Hann er slóðbrótarin í hesum mangan ótakksama starvi at geva børnunum víðari sjónarring, enn foreldur teirra høvdu havt.

Óli Skúlahaldari er lærari í allari oynni og seinni bert í norðaru helvt. Hann upplivir tær stóru broytingarnar í skúlaskapinum: undan Provisorisk Reglement til 1845, tá ið tað kemur í gildi, tíðina við tí, til tað fer úr gildi við nýskipanina í 1854. Hóast hann er fráfarin við eftirløn, arbeiðir hann enn eitt skifti í Fámjin. Tey seinnu árini arbeiðir hann saman við Joen Joensen, og frá prósti, sum hevði alla umsjón við upplæringini av ungdóminum, fáa teir avbera gott skoðsmál sum lærarar.

Sum bygdin mennist, koma fleiri fastir lærarar at starvast her í bygdini, og fleiri av teimum hava laðað sær varðar í tí føroyska samfelags- og mentalívinum. Okur kunnu t.d. nevna Hans A. Djurhuus (1916—19), Martin Joensen (1944—64), Poul F. Joensen (1920—26) og P.M. Dam (1922—67).

Tá ið okur koma inn í 20. øld verður skúli hildin í allari sóknini við barnaskúla í Froðba, Trongisvági, Øravíkarlið og Øravík, og barnaskúli við framhaldsskúla er á Tvøroyri, umframt at privatskúlar vóru, har tann hjá Jóhonnu Mortensen við Sílánna helt longst á, frá u.l. 1900 til 1930.

Fyrst í 20-unum er barnatalið so stórt, at bæði lærarar og foreldur hildu tað vera skynsamt at fara undir fyrireiking til realprógv, og í 1922 verður farið til verka. Í 1925 taka tey fyrstu prógv, ið verður nevnt preliminerprógv. Børnini gingu í 1.—5. flokki og síðani í 1.—4. preliminerflokki. Annars var eisini 6. og 7. flokkur. Næmingar úr Vági gingu eisini til próvtøka her, líka til nýggjur skúli varð tikin í nýtslu í Vági eftir kríggið, og krøvini lokin til tess at fáa próvtøkurætt.

Við skúlalógini í 1962 broyttist skúlaverkið nakað, og nú ganga børnini í 1.—7. flokki og síðani í 1.—3. real, ella 8.—10. flokk og fáa í báðum førum prógv. Í 1979 broytist alt skúlaverkið munandi, og okur fáa ein sokallaðan valskúla: 1.—7. flokk og 8.—10. flokk.

Skúlaleiðslan hesa nevndu tíð hevur verið:

*Jørgen Bennedsen, fyrstilærari 1922—37,*
*Elgerda Jacobsen, 1930—72, skúlastjóri 1949—72,*
*Mannbjørn Mortensen, skúlastjóri 1972—,*
*Jacob Olsen, 1926—71, varaskúlastjóri 1961—71,*
*Erling Ejdesgaard, 1946—, varaskúlastjóri 1971—,*
*Ingier Petersen, 1963—, deildarleiðari 1982—,*

Frá fyrstu tíð hava umstøðurnar at halda skúla verið ymiskar og ikki altíð góðar, men so fóru teir her í



Skúlabørn á Tvøroyri

sóknini at byggja skúlabygningar. Í 1883 verður fyrsti skúlin tikin í nýtslu, og í 1915 verður ein hædd við lofti bygd oman á hann. Í 1927 verður bygt aftur at hesum bygningi oman og niðan uttanfyri í tveimum hæddum við lofti. Men tørvurin á plássi til alla frálæruna er ikki nøktaður við hesum, og høli til eitt nú fimleik verða leigað. Í 1958 verður fimleikahøll tikin í nýtslu og í 1964 svimjihøll. Oman á svimjihøllina er seinni bygd musikkhøll. Mitt í 70'unum verður stórur nýggjur skúli við nógvum serhølum, sum nútímans skúlaskapur krevur, tikin í nýtslu. Hesin er bygdur frá hinum gamla og úteftir; í skúlagarðinum er hondbóltsvøllur, ið óivað er mest nýtta spælipláss í sókníni. Fyrst í 1980'unum er aftur ein barnaskúli við ítrótta- og samkomuhøll komin inni í Trongisvági.

Fyrst í hesi øldini verða skúlahús bygd í Froðba, Trongisvági, Øravík og Øravíkarlíð.

Skúlagongdin hevur verið órógvað nakað undir seinna krígnum, tá ið børnini vórðu spjadd runt í ymsi høli í bygdini, tí skúlin á Tvøroyri lá ov nær við telegrafstøðina og havnalagið, ið vóru álopsmál.

Tá ið skúlarnir í Øravík og Líðini verða niðurlagdir fyrst í 60'unum, verða børnini koyrd í skúlabussi til skúlarnar í Trongisvági og á Tvøroyri. Øll børnini í sóknini ganga í framhaldsskúlanum á Tvøroyri, og aftur at teimum børn úr Fámjin frá 7. flokki og børn úr Hvalba og Sandvík í framhaldsskúlan, men hesi seinastu árini bert í 10. flokki. Skúlatilboð hava eisini verið her og eru enn til øll yvir skúlaaldur.

Í 1932 varð Tvøroyrar Tekniski skúli stovnaður, sum tann fyrsti skipaði skúlin her í Føroyum, og helt hann fram til 1963, tá ið ein donsk lóg kom í gildi og miðsavnaði alla frálæru í handverksfakunum. Eingin serskipan kundi fáast í lag, hóast royndir vórðu gjørdar.

Fyristøðumenn vóru: *Ernst Hansen (1932—47), Hjørleif Enni (1947—55) og Jóhannes Enni (1956—63).*

Sum ein deild av Tekniska Skúla varð stovnaður Tvøroyrar Handilsskúli í 1933. Frá 1935 til 1968 var møguligt at taka „Statskontrolleret Handelsmedhjælpereksamen", men aftur ein nýggj lóg miðsavnaði all hesa frálæru til Føroya Handilsskúla í Havn. Nú er bert møguligt at taka stakroyndir á Tvøroyri og í Vági.

Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli hevur síðani 1960 havt mong fjølbroytt tilboð um vetrarnar, og luttøkan hevur verið jøvn. Undan hesum hevði verið kvøldskúli, men ikki støðugur. Leiðari er Jóhannes Enni.

Frálæra til HF ella hægri fyrireikingarprógv hevur verið givin her síðani 1974, soleiðis at tær fyrstu próvtøkurnar vóru í 1976. Hetta er fyrsta stigið til at spjaða hægru skúlarnar um landið, og vísti tað seg beinanvegin, at mong ung í Suðuroy tóku av tilboðnum og vórðu verandi heima hesi tvey árini, ið frálæran vardi, í staðin fyri sum fyrr at fara til Havnar á Studentaskúlan ella til Danmarkar. Í dag eru 4 HF-flokkar, 2 á Tvøroyri og 2 í Vági. Leiðarar hava verið Jóannes Dalsgaard, Poul Erik Smedemark og nú John Mortensen.

Tá ið skúlin á Tvøroyri í 1983 fylti 100 ár, kom út bók um skúlaskapin í Froðbiar sókn 1812—1975, sum fyrsti partur av Føroya Skúlasøgu. Fyrrverandi skúlastjóri Elgerda Jacobsen hevur skrivað bókina.



## Tveraa Indmark

*Maalt i 1899 af B. Thomsen*

**1: 5000.**

100 0 1 2 3 4 500 Meter

Frodebö Sogn

a Luitle Tippet
b Stoura Tippet
c Treran
d Skole
e Arestims
f Postekspedition
g Kirke
h Laegebolig
i Gaarde
j Kvaunaa
k Luitle Tange
l Puntaberge
m Smidie
n Praeng
o w Byggingum
p Trangjisvaags Fjorden
q Tyr
r Tyr



# Nakað um óvanligar hendingar

Tríva vit niður í tilfarið um ymiskar hendingar í samband við flogfør, vita vit, at R.B. Thomsen helst sum tann fyrsti føroyingurin í flogfari ger túrin úr Keypmannahavn til Berlin í opnum týskum tveymans flogfari í 1927. Sami Richard B. Thomsen kemur seinni sum týskur konsul at hava samband við týska flogskiparan von Gronau, sum vitjar her á fjørðinum heilar 4 ferðir, fyrstu ferð 29. august 1928 og seinastu ferð í 1932. Á einum av túrunum — 19. august 1930 kom von Gronau í stak vánalig floglíkindi, og brúkti hann ikki minni enn 6 tímar og 30 minuttir um túrin Týskland—Trongisvágsfjørð.

Í 1932 vitjar von Gronau á Tvøroyri fyri seinastu ferð. Hann gistir sum vant hjá Josefinu Mortensen, har veitsla eisini varð hildin. Tað


Lindbergh og Gudmund Mortensen.

sigst, at von Gronau hetta veitslukvøldið sigur frá loyniferð síni í Amerika. Roynt hevur sjálvandi verið at fáa hann at siga tað, sum hann visti um Føroyar, men tá tagdi von Gronau.

Í 1930'unum høvdu Føroyar ikki so heilt fáar vitjanir av flogførum, og var hetta nakað heilt nýtt fyri okkum. Tey flestu flogførini lendu í Føroyum fyri at fáa sær bensin á ferð víðari til m.a. Grønlands. Í 1931 fekk Havnin sína triðju vitjan av flogfari, og sigur hetta tal okkum, hvussu sjáldsamar hesar vitjanir vóru.

Í 1933 fáa Føroyar eina sera áhugaverda vitjan av einum flogfari, sum kemur at hava sín lut í søguni hjá Tvøroyri. Tað er Charles Lindbergh, sum skuldi koma úr Amerika til Europa at kanna líkindini fyri eini flogrutu her norðuri á leiðini úr New York til Keypmannahavnar. Charles Lindbergh hevði frammanundan framt tað bragd at flúgva einsamallur úr New York til París upp á 33 og ein hálvan tíma uttan millumlending.

Hetta bragdið, sum gjørdi Lindbergh heimskendan, varð framt í 1927. Boðað varð frá, at Lindbergh á síni kanningarferð í 1933 skuldi millumlenda í Føroyum, og hetta hevði stóran áhuga millum fólk, sjálvt um tey ikki rættuliga vildu trúgva tí. Føroyingar høvdu fleiri ferðir staðið í dagar og gánað upp í loft eftir einum flogfari, og tá ið til stykkis kom, hevði tað bara hildið leiðina fram til næstu støð, uttan at seta seg. Men hóast alt, so vónaðu fólk inniliga at sleppa at síggja henda heimskenda flogskiparan lenda í Føroyum. Lindbergh sjálvur var ikki heilt vísur í, hvar hann skuldi lenda. Eisini var møguligt at lenda í Hetlandi, og av tí at óvissa til tað seiansta valdaði í hesum spurningi, varð avgjørt at gera klárt til at taka ímóti Lindbergh. Bensin varð sent til Tvøroyrar, tí har skuldi Lindbergh lenda. Hetta dámdi tvøráfólki, tí nú mettu tey, at eingin fjørður í Føroyum var so væl egnaður til flogstøð sum Trongisvágsfjørður. Tvøroyri kundi nú gerast týðandi pláss á flogleiðini millum Amerika og Europa, og ein glæsilig framtíð fyri Tvøroyri var fyri stavn.

Tann 23. august hendir so tað, sum tvøráfólk í skjótt tveir dagar hava bíðað spent eftir. Eitt fjarrit kemur, sum sigur, at Lindbergh er farin úr Reykjavík, og at hann skal lenda á Tvøroyri. Lítla løtu seinni lendir Lindbergh á Trongisvágsfirði, til stóra gleði fyri hvørja livandi sál á Tvøroyri, sum tók ímóti. Flogfarið varð bundið til eina boyu á fjørðinum, og báturin við Lindbergh og konuni legði lítla løtu seinni at landi. Stór mannamúgva var samankomin, og sóknarstýris formaðurin á Tvøroyri, Herluf Thomsen, tók ímóti. Eftir at rópt hevði verið hurrá fyri gestunum, fóru teir niðan til Gudmund Mortensen. Kona Lindbergh, Anne, var navigatørur og radiotelgrafistur á ferðini. Gudmund hevði fingið at vita frammanundan, at Lindbergh var sjálvur annar, og tí varð gjørt eitt serligt rúm til navigatørin. Tað var ikki løgið, at hann gjørdist bilsin, tá ið hann varð varigur við, at



Flogfarið hjá Lindbergh á Trongisvágsfirði.

flogskiparin og navigatørurin vóru maður og kona.

Uppi hjá Gudmundi varð givið loyvi til blaðmenn og aðrar at seta Lindbergh spurningar. Bæði konan og Lindbergh vóru fryntlig og blíð, men tá ið spurt varð um rutuna úr New York til Europa, vildu tey einki siga. Danir vóru ógvuliga spentir í hesum máli, tí Pan-American Airways hevði ætlanir um at lata rutuna fara í tvíningar úr Hetlandi, so onnur rutan fór til London og hin til Keypmannahavnar. Men tað hvørki datt ella drap úr hesum dámliga manni, sum nú bert vildi hava frið. Sóknarstýrið á Tvøroyri hevði um kvøldið fyrireikað stóra veitslu fyri Lindbergh. Hann og konan bóru seg undan at luttaka, tí so stutt tíð var fráliðin, síðan tey mistu sonin. Ístaðin beyð Gudmund nøkrum gestum heim til húsa at eta døgurða saman við teimum.

Lindbergh og konan støðgaðu ikki leingi á Tvøroyri, tí dagin eftir fóru tey avstað aftur. Eftir áheitan ger Lindbergh eitt legg inn yvir Vágs bygd, áðrenn leiðin verður sett móti Hetlandi.

Dreymurin hjá tvøráfólki um flogstøð á Tvøroyri gekk ikki út. Í langa tíð aftan á vitjan Lindberghs varð kappast millum Tvøroyri og Havnina um flogstøðina, og vit vita øll úrslitið. Í dag eru vit stolt av, at ein heimskendur flogskipari sum Lindbergh hevur havt somu áskoðan um Trongisvágsfjørð, sum vit altíð hava havt, og framvegis hava, og er tað nevniliga: **Trongisvágsfjørður er bestur.**

# Ítróttafeløgini á Tvøroyri

Tá ið skrivað ella tosað verður um ítróttafeløgini á Tvøroyri, er tað sjálvsagt, at tað er Tvøroyrar Bóltfelag, ið liggur einum fremst í huganum. Tvøroyrar Bóltfelag varð stovnað 13. mai í 1892, og sigur hetta árstal okkum, at TB má vera eitt hitt elsta fótbóltsfelag í heiminum. Eisini sigur stovningarárið okkum, at Tvøroyri longi tá — bæði sum bygd og bústaður — lá á odda hvat trivnaði viðvíkur.

*Her komu fólk úr landsins*
*bygdum flest*
*her vóru virkir og livikor best.*

Tað verður neyvan nakað ítróttarfelag stovnað, uttan at trivnaður er. Tá ið Tvøroyrar Bóltfelag varð stovnað, var arbeiði til allar hendur bæði á sjógvi og landi, og hevur hetta verið orsøkin til øll tey góðu úrslit, hetta megnar felag hevur glett okkum tvøráfolk við.



Oliver Eystberg í tí eldra TB-búnanum.

Tað ganga nógv ár frá tí at felagið er stovnað, til tað næsta fótbóltfelagið — Havnar Bóltfelag — verður til. Hetta hendir í 1904, og kemur sjálvandi at hava týdning fyri TB. Tað verða hesi bæði feløgini, ið koma at mynda fótbóltin í Føroyum, ikki altíð tí at tey vóru tey bestu, men eisini tí at hetta vóru aldursforsetarnir í føroyskum fótbólti, sum hini sóu upp til. Sjálvt um HB varð stovanð í 1904, so verður fyrsti dysturin millum bæði feløgini ikki spældur fyrr enn í 1909. Hesin søguligi dystur verður spældur á Tvøroyri 5. juni — grundlógardagin — í 1909. At menn ikki vóru heilt greiðir yvir leikreglurnar tá, er einki at ivast í. Ósemja var millum bæði feløgini um, hvussu nógvir leikarar skuldu vera á hvørjum liði. TB vildi hava 9, meðan HB helt fast við 10. Feløgini samdust tó til seinast, og avgjørdu, at 10 spælarar skuldu vera á hvørjum liði. Úrslitið av fyrsta fótbóltsdystinum millum tvey føroysk ítróttafeløg gjørdist javnleikur 2—2.

Fyrsta steypið TB vinnur, er Van Merhens, og hendir hetta í 1911. Hetta steypið verður roknað sum størsta ogn felagsins. Næst eftir hesum steypi kemur Bulldog, sum TB vann, uttan at tapa ein einasta dyst í

„At rógva kapp“ er nakað, sum føroyingar altíð hava gjørt. Róð varð kapp í gomlum døgum, tá ið menn fóru til útróðrar, tí tað ráddi um at koma sum skjótast út á fiskileið. Eisini varð kappróð, tá ið menn fingu at hoyra grindaboð; hetta varð gjørt fyri at koma sum skjótast til grindina, sum hevði so stóran týdning fyri okkum. Men veruligur skipaður kappróður er ikki komin fyrr enn nógv ár seinni enn skipaður fótbóltur kom.

Froðbiar Sóknar Róðrarfelag varð stovnað í 1934, og vóru tað fólk við tilknýti til TB, sum tóku stig til stovnanina. Róðrarfelagið hevur altíð verið eitt væl fyriskipað felag, ikki bert ítróttarliga, men sanniliga eisini fíggjarliga. Hetta sæst við tað, at felagið er fyrsta felag í Føroyum, ið fær egin felagshøli. Hyggja vit at úrslitunum hjá felagnum, so kann ikki sigast annað, enn at tey eru glæsilig. Nøvn sum **Suðuroyingurin, Tjaldrið** og ikki minst **Firvaldur** munnu mangan hava fingið blóðið hjá bygdarfólkinum at orna, og hava hesir bátar eisini mangan givið hinum kappróðrarbátunum nakað at hugsa um.

Nú dag verður ikki róð longur við trý fylgjandi ár.

Eins og onnur ítróttafeløg hevur Tvøroyrar Bóltfelag mangan verið í aldu-dalinum, men ongantíð hava brotini verið so stór, at tey hava tikið felagið av fótum. Hetta er teimum fyri at takka, sum á vølli eins og uttan fyri vøllin hava barst fyri felagnum, og so at siga givið tí hvønn bitan av frítíðini. Hetta lyndiseyðkenni — saman við bóltkunnleika — ger tað, sum skaldið í 1952 skrivaði, framvegis galdandi; tí kunnu vit enda hesa stuttu umrøðu av Tvøroyrar Bóltfelag soleiðis:

*Á odda TB stinna*
*ber merki í sítt skjøld*
*„Okur vilja vinna.“*

## Froðbiar Sóknar Róðrarfelag

Tikið verður mangan til, at føroy-

Alec Bech, ein tann besti føroyski borðtennisleikarin nakrantíð.


BARNA





Suðuroyingurin fremst á ólavsøku 1962.

ingar eru føddir við ár í hond, og ásannast má, at nakað er um hetta. Er tað nakað, sum hugtekur føroyingar, so er tað kappróður, og fær henda ítróttagrein ofta blóð okkara at renna skjótari enn vanligt í ber- **Suðuroyingi,** tí menn mettu, at hann var vorðin ov gamal. Felagið hevur fingið sær nýggjan bát, og nevnist hann **Tvøråbáturin**. Saman við **Firvaldi** við gentu- og dreingjamanning, er **Tvøråbáturin** við til hvørja stevnu í ár, og hava bátarnir staðið seg heilt væl.

## Onnur feløg

Sjálvt um TB og FSR eru tey best kendu ítróttafeløgini á Tvøroyri, so hava vit onnur ítróttafeløg, sum hava gjørt seg galdandi í kappingum. Vit hava eitt stórt fimleikafelag, sum hvørt ár hevur eina framsýning til stóra gleði fyri øll. Hetta felag hevur ikki altíð havt líka lætt við at útvega sær leiðarar, og er tað serliga galdandi innan dreingjafimleik. Í dag eru bert kvinnur, ið íðka í felagnum, men um ikki heilt langa tíð verður dreingjafimleikur aftur at síggja. Tey, sum stjórna Tvøroyrar Fimleikafelag, gera eitt stórt arbeiði fyri at halda lív í felagnum, og eiga tey stóra tøkk uppiborna fyri tað.

Tvøroyrar Svimjifelag er eisini eitt ítróttafelag, sum hóast ikki alt ov góðar umstøður gjøgnum árini hevur megnað at gjørt um seg til kappingar. Felagið hevur vunnið fleiri meistaraheiti, og fer uttan iva at vinna enn fleiri í framtíðini. Felagið skipar hvønn dag fyri svimjing á Tvøroyri, til stóra gleði fyri mong.

Hondbóltgentur og leiðarar í byrjanini av krígsárunum. Frá vinstru: Páll Nolsøe, Solveig Olsen, Birgit Thomsen, Jensa Viberg, Hanna Bærendsen, Emely Joensen, Hansina Nolsøe og Poul Holm.



Tvøroyrar Borðtennisfelag hevur altíð verið eitt virki felag. Úrslit skara framúr, sjálvt um felagið fyri fáum árum síðani var niðri í aldudalinum. Við miðvísari venjing av teimum yngru spælarunum hevur eydnast felagnum at arbeiða seg upp aftur, fyri skjótt aftur at gerast einaráðandi í føroyskum borðtennis.

Síðani ítróttahøllin í Trongisvági varð tikin í nýtslu er Tvøroyrar Badmintonfelag stovnað. Hetta er nýtt felag, sum ikki enn hevur roynt seg stórvegis í kappingum. Umstøðurnar eru so góðar nú, at roknast má við, at felagið í framtíðini fer at mennast.

Ítróttafólk á Tvøroyri vil altíð hava, at sangurin hjá Poul F skal standa fremst í huganum, tá ið farið verður til kapping:

*Vit skulu sýna tað, at tvørámenn*
*í handans virki roynast fullvæl enn*
*í ítrótti og skaldskapi og list,*
*stavnhald vera skal: Tvøroyri fyrst.*



# Úr fiskakarinum til nýmótans flakavirki

*Vit hava verið inni á gólvinum hjá Lenu Bærendsen, ið er elsta útiarbeiðandi kvinna á Tvøroyri — 82 ára gomul.*

— Eg eri ættað úr Fuglafirði, dóttir Rakel og Elias Toftegård. Eg var næstelst av 8 børnum, har av 2 doyðu sum smá. Pápi mín var sjómaður. Eg var ikki meira enn 10 ár, tá ið eg fór á fiskaplássið hjá Pidda at arbeiða eftir skúlatíð.

— Emil, beiggi mín, var yngstur av systkjunum. Eg minnist, at tá ið hann varð føddur, mátti eg verða heima úr skúlanum í 5 vikur, og royna at passa húsið. Omma sat har; hon orkaði lítið, men so sat hon og segði, hvussu eg skuldi gera.

— At eg kom suður higar, var tí at Oluffa Hansen (gift Bærendsen) ið var sjúkrasystir, bað meg koma við sær suður á Tvøroyri, tí tað manglaði fólk á sjúkrahúsinum. Tá var eg 17 ára gomul. Jú, so fóru vit báðar avstað; men tað var soleiðis, at veðrið var so ringt, at gamli Smyril sigldi ikki, so vit máttu støðga í Havn í 2 dagar. Men mær longdist so illa, longu tá ið vit vóru komnar til Havnar, at eg bønaði Luffu um at lova mær norður aftur; men tað var ikki talan um. Tá ið vit komu suður, var bert ein sjúklingur — ein týskari. Sjúkrasystirin, Elin í Fámjin, var farin, áðrenn vit komu, og vit máttu fara til verka beinanvegin. Á, Jesus, sum mær longdist illa. Ikki dugdi eg at siga eitt orð við henda týskaran, gav honum mat og royndi at hjálpa honum sum best. Skjótt komu fleiri sjúklingar.

Mær dámdi væl at arbeiða á sjúkrahúsinum; har var ógvuliga nógv at gera. Vit máttu líkasum gera alt arbeiðið, sum var. Tað var ikki tá sum nú; tá vóru petroliumslampur og kolovnar. Eg skuldi eitast at vera stovugenta, men mátti gera alt møguligt; og vit royndi at hjálpa hvørjum øðrum.

— Effersøe var lækni tá. Til skurðviðgerðir kom doktari úr Havn. Eg var altíð við til skurðviðgerðirnar. Eg minnist einaferð

Doktor Dahl, yvirlækna, ið skuldi geva eini kvinnu keisarasnitt. Hann sveittaði ógvuliga illa, so eg fekk til arbeiðis at turka honum, skifta serviettar og turka honum alla tíðina. Ja, og hetta var sera troyttandi, tí ikki mátti dryppa niður á patientin.

— Tyfuspatientar vóru tað ringasta. Tá mátti man vera varin. Onkur við tuberklum lá eisini og bíðaði á sjúkrahúsinum at koma á sanatoriið í Havn. Eg fekk so tyfus at enda sjálv. Tá ið tyfus patientar vóru farnir heim, máttu madrassurnar brennast og dýnurnar sendast til Havnar. Einaferð, eg skuldi brenna madrassurnar, lá vindurin inn ígjøgnum fjørðin, og tá má eg hava fingið eina bacillu í munnin, og lá sjúk í 6 vikur.

— Eg fekk 25 krónur um mánaðin í løn. Einaferð keypti eg mær ein frakka fyri 60 krónur og mátti sostatt arbeiða tveir og ein hálvan mánað fyri hann.

— Á sjúkrahúsinum var eg í 3 ár, so segði eg upp og søkti mær pláss hjá Johan Mortensen. Tað var, meðan eg var har, at eg kom at kenna



Palla, sum seinni gjørdist maður mín.

— Eftir hann fór eg at arbeiða í fiski. Eg var 22 ára gomul tá. Fyrsta fiskaarbeiði, eg hevði, var hjá Hans Paula Nolsøe á Tanganum. Tá hetta helt uppat, fór eg út á Hvítanes at arbeiða. Niels Pauli Mortensen var formaður tá. Ja, tað var ofta troyttandi, men tað gekk. Øll royndu at arbeiða. Tá vóru ongar pengatíðir. Vit kundu arbeiða heilar dagar fyri 1 krónu og 80 oyru. Tað er undarligt at hugsa aftur á; veðrið var nógv betri tá, enn tað er í dag.

— Gudmundur Mortensen hevði nógv arbeiði har úti og kundi tí ofta senda boð inn á Hvítanes at lána nøkur fólk at seyma pakkar og vaska fisk. Soleiðis fóru vit út við hvørt. So var tað, at Flakavirkið byrjaði. Niels Juul bað Hannu Bettu og meg koma at arbeiða.

— Eg havi ikki arbeitt úti, uttan at steðgur hevur verið í. Eg byrjaði nøkur ár eftir, at eg var gift. Vit



fingu tveir synir, og tá ið teir vóru blivnir eitt sindur størri, so fór eg at arbeiða í fiski aftur.

— Lívið var harðari fyrr; saltfiskurin var tungt arbeiði; tað kendist merkiligt í fyrstani at arbeiða á flakavirkinum hjá Niels Juel. Eg fór beinanvegin at pakka flak. Har var nógvur larmur og trongligt; hurðarnar stóðu opnar og har varð ikki nógv tos. Alt hendi í tí sama rúminum.

— Tá ið eg var 70 ára gomul, skuldi flytast í nýtt flakavirki. Hannu Betta og eg tosaðu um, um vit máttu sleppa oman har. Eg segði við hana: Nei, nei, tú skalt ikki trúgva, at vit báðar; sleppa, teir vilja hava yngri fólk — okur eru so gamlar —. Hannu Betta var fleiri ár yngri, og eg segði við hana, at hon kundi fara oman, men eg fór ikki. Jú, men so fari eg heldur ikki, segði hon. Tú mást fara, um tú verður biðin, segði eg við hana; eg vænti ikki, eg verði biðin. Men tann dagin, tá ið flytast skuldi, komu teir, sum stílaðu fyri, og bóðu øll koma oman. So fóru vit, og væl bar til. Hetta nýggja flakavirkið er, sum eg veit ikki hvat, aftur ímóti hinum gamla. Her er heitt inni, og her er kantina. Eg plagi at siga við tey, tá ið tey gremja seg um yvirtíðararbeiði, at tey skulu bara vera glað fyri, at tey orka at arbeiða. Sjálvandi er ofta troyttandi. Tey arbeiða frá kl. 08.00 á morgni til kl. 21.00 á kvøldi. Men tað verða bert 2 ár síðani, at eg fór niður í hálvan dag, seinnapartin. Eg var, sum sagt, 70, tá ið eg byrjaði á nýggja flakavirkinum, og nú eri eg 82 ár.

— Eg veit ikki, nær eg skal halda uppat. Eg eri komin so í vana at arbeiða, at eg fái ikki upp í lag at steðga.

# Kirkjan á Tvøroyri

Uttan iva gongur kirkjunnar søga við Trongisvágsfjørð aftur til katólska tíð. Hugsandi er, at elsta búsetingin her er í Froðba og staðarnavnið „har úti í Bispagarðinum," sigur óivað, at biskupurin hevur havt tilhaldsstað har, tá ið hann hevur verið í oynni. Og so kann hugsast, at kirkja eisini hevur verið har.

Seinasta kirkjan, sum hevur staðið úti á Bø, varð bygd í 1840. Og varð hon bygd sum tær vanligu føroysku bygdakirkjurnar tá.

Í 1856 varð henda kirkjan tikin niður og flutt inn á Tvøroyri, og sett upp aftur í Kirkval, har Fylking nú stendur. Óivað er hetta gjørt fyri at trongisvágsingar ikki skuldu hava so langan veg. Sum flestum kunnugt varð handa kirkjan í 1908 tikin niður og flutt til Sandvíkar, har tilfarið av henni varð nýtt til kirkjuna har á staðnum.

At gudshús eisini hevur verið í Trongisvági í katólskari tíð, týðir staðarnavnið „við Bønhús" á. Har eru eisini leivdir av kirkjugarði.

## Núverandi skipan

Seinast í síðstu øld byrjaði skipsfiskiskapurin av álvara at taka seg upp í Føroyum, og gjørdist Tvøroyri eitt av høvuðsstøðunum í samband við hesa vinnu. Soleiðis tvífaldaðist fólkatalið her í sóknini frá í 1880 at vera 456 fólk til í 1901 at vera 933.

Hetta førdi við sær, at kirkjan gjørdist alt ov lítil.

Í sýnisprotokollini fyri 1898 siga sýnismenninir Gudmund Sivertsen, Tvøroyri og Poul Johannes Lindberg, Trongisvágur soleiðis um kirkjuna: „Kirken er for lille for den stærkt voksende Menighed, hvorhos den er gammel og tildels affældig. Den bliver derfor at kassere til ombygning saa snart Omstændighederne maatte tillade dette. Indtil den tid bliver den at holde vedlige, saaledes at den kan være i brugelig stand."

Men tá høvdu ætlanirnar um eina nýggja kirkju longu verið frammi. Tí í juli mánaði 1897 var bræv sent Evensen, prósti, undirskrivað av sóknarstýrinum og 39 øðrum persónum úr sóknini, har biðið varð um at nýggj kirkja varð gjørd úr timbri og ikki úr gróti.

Men tað var ikki bara sum at siga tað, at fara undir at byggja nýggja kirkju. Kirkjukassin fyri Suðuroynna vísti stórt undirskot. Og tann peningur, Løgtingið játtaði til tílík endamál, fór til bygging aðrastaðni.

Men 24. august 1899 leggur Kirkjustjórnin skriv inn fyri tingið, har mælt



verður til, at farið verður undir at byggja nýggja kirkju á Tvøroyri, tí kirkjan í Fugloy verður liðug um heystið. So peningurin, sum nú fer í kirkjukassan í 1900—1901. kundi fara til hetta endamálið. Eisini verður nevnt í uppskotinum, at álagt eigur at verða Froðbiar sókn í hesum tíðarskeiði at álíkna eitt ávíst tal av pliktdøgum, so fyrireikingararbeiðið kann byrja beinanvegin, og farið kann verða undir sjálva bygginginga 1901.

Kirkjustjórnin heldur eisini, at áheitanin frá borgarum í Froðbiar sókn í 1897 eigur at verða tikin til eftirtektar, og at trækirkja eigur at verða bygd. Eisini átti at verða tikið hædd fyri tí skjótt vaksandi fólkatalinum, so ein hóskandi støðd vildi vera 36 × 14 alin, sama støðd, sum Havnar Kirkja hevur.

Tá ið Løgtingið umrøddi málið sama árið, vóru menn á einum máli um, at neyðugt var at fara undir nýggja kirkju í Froðbiar sókn. Men ósemja tók seg upp um tilfarið, ið nýtast skuldi.

Endin á øllum varð, at Løgtingið samtykti: „at anmode Kirkeinspektionen om at indhente Overslag — eventuelt fra udenlandske Fabrikker — omkostningerne ved Opførelse af en Kirke af Sten, Tømmer eller Jærn af de i Inspektionens Skrivelse af 24de August stipulerede Dimensioner og at

Niðan til Kirkwall umleið 1900. Húsini, sum eru á myndini:
Húsini hjá Mortan í Sandi (nú Dagny Debes)
Hjallur hjá Jens Paula Johannesen (Gamla Jens Paula)
Hús hjá Jens Beck, seinri Poul Johannesen (Polla). Jens Beck varð nevndur Jens á Brekku.
Kirkjan á Tvøroyri, sum seinri varð flutt til Sandvíkar og er tað partvíst grundøki hjá felagshúsum Fylkingar.
Húsini hjá Niels Niclasen við Reidlið, har sum politistøðin er nú.
Húsini hjá Valdemar Jespersen, pápi Andru, sum er á myndini, og er tað har húsini hjá Anker Danielsen standa.



forelægge disse for det til næste år sammentrædende Lagting:"

Tað einasta, sum hendir í málinum, er, at Petur í Mattalág 12. aug. 1901 gevur eitt tilboð upp á eina grótkirkju, og kostar hon 21.200 kr.

Her støðgar málið upp. Og gongd kemur ikki á aftur fyrr enn Busch, prestur í brævi 22/6-04 heitir á Kirkjustjórnina, at nú má nakað gerast við málið, tí núverandi kirkjan er alt ov lítil, so at tað fleiri ferðir er hent, at fólk eru farin heim aftur vegna plásstrot. Og 30. august sama ár verður bræv sent Løgtinginum undirskrivað av 87 borgarum við somu áheitan.

Hetta fekk gongd aftur á málið. Og í heystsetuni samtykti Løgtingið, at bygd skuldi verða ein kirkja úr steini sum høvuðsbyggitilfari. Kirkjustjórnin skuldi taka eitt lán upp á 1000 kr. upp á rokning fyri Kirkjukassan hjá Suðuroyar Prestagjaldi, og Løgtingið játtaði 14.000 kr. at gjalda yvir trý ár. Froðbiar sókn skuldi fyri roknskaparárið 1904-1905 álíkna 600 dagsarbeiði á 12 tímar til fyrireikingararbeiðið.

Froðbiar sóknar kommuna tók undir við hesum á fundi 12. okt. sama ár. Og á hesum fundi gav Daniel Mortensen boð um, at hann vildi lata grundstykki til kirkjuna. Men fyri at fáa tað eitt sindur meira rúmsátt um kirkjuna, skuldi heitast á hagaeigararnar omanfyri at lata nakað til kirkjuøkið. Eisini varð tikið út Uttara Hváli. Og soleiðis kom tað eisini at verða. Eisini varð viðtikið, at kirkjan skuldi vera laðað av tilhøgdum gróti og ikki pussað uttan.

Á einum fundi seinni um árið segði Petur Mortensen sum umboð fyri A/S J. Mortensens Eftf., at teir vildu geva byggitilfarið til kirkjuna, undantikið grót, sand og arbeiðsløn. Á hesum fundi varð eisini viðtikið, at arbeiðslønin fyri pliktarbeiðið skuldi vera 25 oyru um tíman.

Beint eftir nýggjár 1905 varð so farið í gongd. Endalig loyvi frá hagaeigarunum vóru fingin til vega.

Heitt var eisini á P.C. Johannesen at standa fyri grótarbeiðinum; men hann bar seg undan. Síðan varð heitt á J. A. Arge um at gera tað, og játtaði hann hesum. Hann gjørdi eina skitsu av grundplaninum. Men fyri at „kunne tilvejebringe en virkelig smuk og stilfuld Kirkebygning" varð hildið rættast vera at fáa hjálp frá einum arkitekti. Hann skuldi gera tekning og kostnaðarætlan. Og til hesa uppgávuna varð heitt á Viggo Bergram arkitekt í Keypmannahavn, sum játtaði hesum. Men nú varð eisini hildið, at ætlaða kirkjan var nakað smøl í mun til longdina, og varð hon tí breiðkað 2 alin, so støddin skuldi verða 36 × 16 alin innan. Hæddin skuldi vera 7 alin.

3. februar 1905 varð so skjøtil settur á. Arbeiðið gekk væl at byrja við. Men í apríl kom støðgur í. Tað vísti seg, at kirkjan kom at gerast nógv dýrari enn roknað var við.

Løgtingið fekk málið aftur til viðgerðar, og varð í september 1905 samtykt at álíkna sama pliktarbeiðið, sum áður var gjørt.

Sostatt vórðu íalt játtaðar 20.000 kr. til byggingina, men av hesum vóru nýttar gott 3.000 kr. til arbeiðið, ið gjørt var, og komu tí umleið 5.000 kr. at vanta í fyri at fáa endarnar at røkka saman.

Løgtingið sá seg ikki ført fyri at játta meira pening enn játtað var. Og Froðbiar kommuna helt seg ikki kunna álíkna meira pliktarbeiði enn tað, sum longu var gjørt.

Hugsað varð nú um at gera nýggjar tekningar og laða kirkjuna upp av ótilhøgdum gróti og so pussa hana uttan. Men Petur Mortensen førdi fram á fundi í kommununi, at um ein trækirkja varð bygd ístaðin, vildu teir lata alt timbrið.

J. A. Arge sigur arbeiðið frá sær og vil ikki fara í holt við tað aftur. Og tá ið hann ikki vildi gera tað, og P. C. Johannesen hevði sagt nei til ein fyrispurning um at halda á, varð ikki hildið ráðiligt at gera steinkirkju, men sleppa hesi ætlan, og í staðin at byggja

trækirkju. Og her kom tilboðið frá Petur Mortensen væl við.

18. januar 1906 gjørdi amtmaðurin C. Bærentsen og Fr. Petersen, próstur, eitt nýtt tilmæli til Løgtingið. Teir skutu upp, at seinna játtanin upp á 6.000 kr.fall burtur, men at tær 14.000 kr. sum fyrst vórðu játtaðar, og sum longu hevði verið brúkt av, vórðu útgoldnar, og at Løgtingið gjørdi eina nýggja viðtøku, har treytin „at Kirken opføres af Sten som Hovedbygningsmateriale" varð strikað.

Tá ið málið hevði skund, so arbeiðið kundi koma í gongd aftur, var ikki tíð til at bíða, til Løgtingið kom saman aftur á Ólavsøku. Tí varð avgjørt at skriva til hvønn einstakan tinglim, um teir kundu geva eina skrivliga váttan um, at teir góðtóku ta loysn, sum vald var.

14 tingmenn svaraðu aftur. 11 søgdu ja, 1 segði nei og 2 ivaðust. Hinir 6 svaraðu ikki.

Men tá ið Løgtingið seinni viðgjørdi málið, varð tað samtykt við 16 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Sama dag, sum tilmælið til Løgtingið varð gjørt, varð skriv sent A/S J. Mortensens Eftf., har teir vórðu spurdi, um teir vildu átaka sær at lata kirkjuna gera. Teir tóku av. Men treytin var, at teir kundu góðtaka tekning og byggiætlan, og at amtið og próstiið fingu tær til vega so skjótt sum til bar. So skuldu teir fáa eina útlendska verksmiðju at gera kirkjuna klára at seta upp í Føroyum, helst sama árið.

Samráðingar fóru nú fram millum eitt umboð frá A/S J. Mortensens Eftf. og Viggo Bergram um eina nýggja tekning. Og kom trækirkjan at verða nokk so lík tí upprunaligu ætlaðu steinkirkjuni, hann áður hevði teknað. Hetta varð sjálvandi gjørt fyri at grundin, sum laðað var, kundi brúkast. Og var hetta eisini bí ligasta, besta og skjótasta loysnin. Fr. Petersen, próstur, hevði fingið myndugleika frá Kirkjustjórnini at taka avgerð í hesum máli. Og tá ið hann, staddur í Keypmannahavn seinni sama vár, hevði givið sína góðkenning, varð farið víðari við málinum.

Samráðingar vórðu nú tiknar upp við Strømmen Træfabrik A/S í Noregi um gerð av kirkjuni. Og eftir endaligar góðkenningar frá A/S J. Mortensens Eftf. og Fr. Petersen, prósti, fór arbeiðið upp á kirkjuna í gongd á heysti 1906.

Samstundis, sum kirkjan varð umbiðin, bóðu Mortensensmenn somu verksmiðju gera teimum ein handilsbygnin — Uttara Handil.

Og tá hesir báðir bygningar vóru lidnir í 1907, var „Føringurin" hjá Mortensensmonnum í Noregi eftir teimum og førdi teir heim.

Kirkjan varð sett upp á ætlaða staðnum. Um várið 1908 var hon klár at taka í nýtslu, og Kr. Himmalsferðardag sama ár, varð hon vígd.

Trong hevði føðingin hjá hesi kirkju verið. Men so hevur eisini Busch, prestur, rætt, tá ið hann í „Færøsk Kirketidende", nr. 12 — 15.06.1908 sigur m.a.: „Varede det længe inden vi fik en ny Kirke, saa fik vi nu ogsaa vore Ønsker om en rummelig og tidssvarende Kirkebygning rigelig opfyldt".

Ein prýðiligur bygningur, sum framvegis ger seg galdandi í býarmyndini.

1836 - 1986
TVØROYRI

# Ymisk tiltøk
# juni—desember 1986

**5. juni** Elstu fótbóltsfeløgini TB—HB møtast til steypadyst á Sevmýri. Fimleikafelagið hevur undirhald í hálvleikinum.

**14. juni** Simultan-talv, John Rødgaard skipar fyri í Tvøroyrar skúla.

**27. juni** Fimleikafelagið fær vitjan úr Danmark.

**25. juli** Dansifelag úr Højby vitjar Tvøroyrar Dansifelag.

**7. aug.** Dansifelag úr Noreg vitjar Suðuroyar n. Dansifelag.

**22. aug** Legubál kl. 20.00, KFUM skótarnir

**22. aug** Dansur fyri tey ungu.

**23. aug** kl. 09 loppumarknaður og kl. 10 morgunkaffi í miðbýnum, KFUM skótar skipa fyri

**23. aug** „Westward Ho" vitjar aftur.
Fólkafundur í Krambagarðinum hjá Thomsen.
Listaframsýning í Tvøroyrar Skúla.
Barnasjónleikur í Tvøroyrar Klubba.
Borðreitt verður í Nýggja Skúlagarði — ymist undirhald.
Túnadansur (før. og ensk.) í Gamla Skúlagarði.

**24. aug** Listaframsýningin heldur fram.

**24. aug** TB í landskappingardysti við GÍ.

**4. sep** Kvøldseta við pensionistafelagnum.

**13. sep** Sløkkiliðið og Bjargingarfelagið í roynd og veru.

**20 og 21 sep** Ítróttartiltøk

**13—19 okt** Framsýning í skúlanum í Trongisvági.

**15. okt** Fyrilestur (fyrsti av fleiri)

**19. okt** Sangkórið og Hornorkestrið skipa fyri konsert í Trgv. Skúla.

**25. okt** Býráðið bjóðar almennum umboðum.

**9. nov** Kirkjukonsert.

**13. nov** Sjónleikur (fyrsta framførsla), í Tvøroyrar Klubba.

**22. nov** Kvøldseta í Trongisvágs Skúla.

**14. des** Jólatræið verður tendrað.

1836 ~ 1986

TVØROYRI